Nærkast málinum

Jan Müller, ábyrgdarblaðstjóri á Sosialinum, sigur, at víðkanin av blaðútberingini er í tráð við politikkin hjá Sosialinum við bygdarredaktiónum og royndini í at koma nærri málinum at røkka lesarar runt um í landinum

BLAÐÚTBERING
Solby A. Eliasen
solby@sosialurin.fo

– Sosialurin vil verða eitt blað fyri allar føroyingar, og tískil arbeiða vit eisini fram ímóti, at tænastan fyri haldararnar runt um í landinum skal vera á sama støði, sum hon er í Havn. Enn er langt eftir á mál, men hetta má so sigast at vera ein byrjan, sigur Jan Müller og vísir á, at í Føroyum er ikki bara sum at siga tað, at fáa bløðini út til allar oyggjarnar. Hann sigur, at í einum oyggjalandi, ber ikki til at samanbera slíka útbering kring landið við til dømis Danmark, har hon næstan kann fáast frá hondini á súkklu.

Hann vísir á, at hetta við blaðútberingini byrjaði í sínari tíð, tá Postverkið legði blaðútberingina tann týdningarmesta dagin í vikuni, leygardag, niður.

– Hetta tvingaði bløðini til at finna eitt alternativ, staðfestir hann.

Jan sigur, at sjálvsagt vónar hann, at hetta fer at økja um talið á haldarum í Klaksvík.

– Nú hava klaksvíkingar eitt egið blað. Lokalblaðið Norðlýsið, men tað er kanska meiri lokalt burturav. Meðan vit vilja leggja okkum eftir at vera lokalavís, men so sanniliga eisini landsavís fyri klaksvíkingar, leggur Jan dent á.

Hann vísir á, at hetta so sanniliga eisini er í tráð við royndina hjá blaðnum at nærkast lesarunum runt um í landinum meira. Við bæði bygdaredaktiónum og nú blaðútbering hvørt kvøld í høvuðsstaðnum og Klaksvík, heldur hann, at tað byrjar at líkjast.

– Men tað er onki dulsmál, at enn hava vit langt eftir á mál at gera blaðið betur og at røkka øllum, sigur Jan Müller, ábyrgdarblaðstjóri á Sosialinum.

Blaðútbering hvørt kvøld í Klaksvík

Frá 1. oktober fara haldarar hjá bæði Dimmalætting og Sosialinum í Klaksvík at fáa blaðið í hús sama kvøld, sum tað er á gøtuni

BLAÐÚTBERING
Solby A. Eliasen
solby@sosialurin.fo

Klaksvík:
Blaðútberingin hjá Prentmiðstøðini fer nú at víðka um sítt virksemið. Tað hevur við sær, at haldarar hjá Dimmalætting og Sosialinum í Klaksvík, sum hava postkassa, fara at fáa blaðið sama kvøld, sum tað er á gøtuni.

– Hetta er eitt átak fyri at bøta um tænastuna til haldararnar hjá bløðunum, sigur Hallstein Sigurðsson. Hann er samskipari av blaðútberingini hjá Prentmiðstøðini. Hann greiðir frá, at við hesum fær haldarin bløðini skjótari eftir prent.

Hetta hava tey gjørt í Havn í trý ár, og í komandi viku verður so byrjað í Klaksvík. Ætlanin er so seinni at møguliga taka ein part av Eysturoynni eisini.

Tað fylgja tó onkrar treytir við. Postkassi er ein, og tað skal somuleiðis vera lætt at ganga til húsini, umframt at týðulig áskrift um bústað skal vera tøk, greiðir Hallstein Sigurðsson frá. Sum skilst hevur hetta ligið á borðinum í eina tíð, men nú er tað komið so mikið langt, at byrjað verður komandi mánakvøld.

16 ung fólk fara at ganga við bløðunum á átta myiskum rutum.

– Onkrar rutur eru umlagdar, men sum heild er talan um somu ruturnar, sum tey hava gingið hvørt fríggjakvøld í eina tíð. Størsti munurin er hann, at tey framyvir verða tvey um hvørja rutuna, greiðir Hallstein frá.

Hann hevur verið í Klaksvík og tosað við foreldrini at teimum, ið vanliga bera bløðini út, um broyttu viðurskiftini. Hann sigur, at sum heild tóku tey væl undir við hesum.

Hetta merkir, at tey koma at arbeiða nakað meira. Aðruhvørja viku ganga tey trý kvøld um vikuna og aðruhvørja tvey kvøld um vikuna.

Blaðútberingin er sum sagt bert galdandi fyri haldarar, sum hava fingið bløðini útborin um dagarnar og ikki bokshaldarar. Hetta ti, at Postverkið hevur ikki blaðskiljing um kvøldarnar.

Fimm Nordplus skipanir

Norðurlendska Ráðharraráðið hevur í tíðarskeiðinum 2004-2006 sett í gongd fimm ymiskar Nordplus skipanir, sum veita stuðul til flytføri, netverk og samstarv innan útbúgvingarøkið

TÍÐINDASKRIV
Altjóða Skrivstovan

Skipanirnar venda sær til øll útbúgvingarøki í teimum fimm norðurlendsku londunum og teimum trimum sjálvstýrandi økjunum, Føroyar, Grønland og Áland.

Tí eru fyri tíðarskeiðið 2004-2006 gjørdar fimm nýggjar skipanir, sum venda sær til ymiskar málbólkar, øki og evni.

Nordplus vaksin er ætlað at menna samstarvið fyri fólksliga upplýsing og undirvísing av vaksnum. Næsta umsóknarfreistin er 1. oktober 2004. Í hesum umfarinum ber bara til at søkja um stuðul í samband við flytføri (mobilitet).

Stuðul verður veittur til flytføris- og samstarvsverkætlanir, sum kunnu menna nýggj hugskot, háttaløg (metodur), tilfeingi, partar av skeiðum og tilíkt. Bæði luttakarar og lærarar kunnu vera við í samstarvinum. Harafturat verður stuðul veittur til at kunna um royndir hjá hvørjum øðrum, til kortlegging og útgreining av ávísum økjum og til at byggja nýggj netverk upp. Dentur verður lagdur á, at úrslit frá verkætlanum verða útbreidd. Stovnar og felóg, sum arbeiða við vaksnamannaundirvísing, kunnu søkja um stuðul úr skipanini.

Dentur verður lagdur á, at skipanir skulu snúgva seg um alt umráðið, tá ið tað snýr seg um læring hjá vaksnum - ikki bara tann vanliga skipaða undirvísingin og vanligu frálæru umhvørvini, men eisini onnur óformell undirvísingarumhvørvi.

Grundtankin undir skipanini er at birta upp undir íblástur og at skapa nýggj hugskot tvørtur um mørk, ikki bara millum lond, men eisini tvørtur um ymisk læruumhvørvi- og stovnar. Eisini er ætlanin at Nordplus Vaksin gera tað møguligt at menna og royna nýggj átøk. Skipanin skal stuðla verkætlanum og tiltøkum bæði stórum og lítlum, sum royna at taka upp tær avbjóðingar sum umráðið stendur frammanfyri

Bæði menning og flytføri

Figgjarligur stuðul kann til dømis vera veittur til fyrireikingar til verkætlanir at fyrireika vitjan hjá undirvísarum og øðrum við ábyrgd fyri frálæru. Stuðul kann eisini vera veittur til uppihald í samband við eftirútbúgving, lestur ella undirvísing hjá lærarum og øðrum. Og til skifti millum luttakarar í fólkaupplýsing og í undirvísing fyri vaksin. Harafturat verður stuðul latin til samstarvsverkætlanir sum til dømis tema netverk, menningar verkætlanir og kortleggingar verkætlanir.

Nordplus Vaksin gevur møguleika hjá øllum at vera við í Norðurlendskum arbeiði, bæði teimum sum hava royndir við slíkum arbeiði og teimum sum royna hetta fyrstu ferð. Dentur verður lagdur á at stuðla samstarvi sum fevnir um fleiri sektorar og ymiskar felagsskapir. Norðurlanda Ráðharraráðið varð stovnað í 1971 sum eitt samstarv millum norðurlendsku stjórnirnar. Ráðharraráðið leggur uppskot fram til fundirnar hjá Norðurlanda Ráðharraráðnum, arbeiðir viðari við tilmælum frá ráðnum, ger frágreiðingar til Norðurlanda Ráðharraráðið um úrslit av samstarvinum og stílar fyri arbeiðinum innan tey ymisku økini. Samstarvið verður skipað av samstarvsráðharrunum, sum hvørt landið sær velur. Ráðharraráðið kemur saman til fundar í ymsum høpum - alt eftir hvørjir spurningar eru til viðgerðar.

Endamál

Endamálið við allari flytføris- og netverksskipanini á útbúgvingarøkinum er í altjóða høpi at vera eitt tað týdningarmesta amboðið til tess at fremja til dømis mentan, mál og felags virði, kunnleika, førleika, læru fyri lívið, búskapin og kappingarføríð í Norðurlondum og teirra nærumhvørvi.

Meiri fæst at vita frá Henrik Neiiendam Andersen, hna@ciriusmail.dk, 0045 3395 7083.

Og hjá Altjóða Skrivstovuni í Havn á heimasíðuni www.ask.fo ella um vegis teldupost ask@ask.fo

Skálaberg fingið megnaravtalu

Tað hevur eydnast JFK-Trol í Klaksvík at gera eina megnaravtalu við kendu bretsku handilsketuna, Marks & Spencer, um at flakatrolarin Skálaberg næsta hálva árið skal lata millum 300 og 400 tons av lidnum portiónum til handilsketuna

HANDILSAVTALA
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Tað er ein megnaravtala, sum JFK Trol hevur fingið í lag við bretsku handilsketuna Marks & Spencer, um at lata millum 300 og 400 av lidnum portiónum frá flakatrolaranum Skálaberg.
savnsmynd

Talan er um eina sera góða avtalu, tí í henni er ásettur ein fastur kiloprísur fyri vøruna hjá Skálaberg, og hesin liggur væl oman fyri marknaðarprísin á flaki.

Liðugtviðgjørdar í Grimsby

Herfyri var Skálaberg í Grimsby við teimum fyrstu 50 tonsunum av lidnum portiónum. Í Grimsby tekur tann í Føroyum so kenda fiskaframleiðslufyritøkan Coldwater ímóti vøruni. Portiónirnar verða tiðnaðar upp, áðrenn tær síðani verða liðugtviðgjørdar, so at tær eru klárar at senda í tær mongu sølubúðirnar hjá Marks & Spencer sum fesk vøra. Væntandi verða tær fyrstu av hesum í sølubúðunum um miðjan oktobur mánaða.

Sum áðurnevnt er avtalan einans galdandi í eitt hálvt ár, men hjá JFK Trol hava tey góðar vónir um, at avtalan verður longd, tá ið hetta hálva árið er farið aftur um bak. Fyrsta hálva árið, ið Skálaberg var til fiskiskaps, fiskaði flakatrolarin góð 1400 tons. Verður veiðan hjá Skálaberg á leið tann sama næsta hálva árið, er avtalan við Marks & Spencer sostatt galdandi fyri umleið ein fjórðing av samlaðu veiðuni hjá flakatrolaranum.

Jógvan S. málið útsett

Týsmorgunin skuldi fyrireikandi rættarfundur verða í málinum millum Sp/f Nakkur og Fiskimálastýrið viðvíkjandi Jógvan S, men fundurin bleiv útsettur

JÓGVAN S MÁLIÐ
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Eftir rættarlistanum hjá Føroya Rætti skuldi fyrireikandi rættarfundur verða týsmorgunin í málinum viðvíkjandi fiskiloyvinum hjá Jógvan S, sum fekk nógva umræðu í miðlunum.

Endurgjaldskravið ikki liðugt enn

Rættarfundur var tó ikki týsmorgunin, tí eftir áheitan frá advokatinum hjá Sp/f Nakki, ið átti Jógvan S, var fundurin fyribils útsettur. Advokaturin hjá Sp/f Nakki, Jógvan Páll Lassen, sigur, at fundurin bleiv útsettur, tí at teir enn ikki eru heilt lidnir við at fyrireika endurgjaldskravið. Jógvan Páll Lassen sigur seg tó vænta, at fyrireikandi rættarfundur verður um einar tríggjar vikur.

Sakarmálið millum Sp/f Nakk, ið átti Jógvan S, og Fiskimálaráðið, skuldi fara av bakkastokki týsmorgunin, men málið bleiv útsett, tí endurgjaldskravið hjá Sp/f Nakki er ikki klárt enn.
savnsmynd

Nógv vilja vinna íbúðina

Áhugin fyri at ogna sær ein av lutaseðlunum hjá HB-stuðlum, har høvuðsvinningurin er ein eigaraíbúð, er ovurhonds stórur, og neyvan verður nakar seðil eftir, tá ið drigið verður í næsta mánaði

LUTASEÐLAR
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Í vár var farið undir størstu lutaseðlasøluna í Føroya søga, tá ið HB-stuðlar fóru undir at selja lutaseðlar, har høvuðsvinningurin er ein spildurnýggj eigaraíbúð á Berjabrekku. Fleiri hildu talan verða um ørskap hjá HB-stuðlum, men nú tað nærkast degnum, tá ið dragast skal, kann formaðurin í HB-stuðlum bara ásanna, at tað hevur gingið framúr væl við lutaseðlasøluni.

Fólk keypa fast hvønn mánað

Sólbjørn Thomsen, formaður í HB-stuðlum, sigur, at teir eru serstakliga væl nøgdir við gongdina higartil. Av teimum 20.000 seðlunum, ið blivu prentaðir, eru einans okkurt um 3.000 eftir, sigur hann. – Eg rokni við, at hesir 3.000 seðlarnir verða uppi, tá ið oktobur mánaður er hálvrunnin, tí tað eru nógv fólk, ið keypa fast hvønn mánað, og við gongdini í søluni annars í huga vænti eg, at alt verður útselt, áðrenn drigið verður 22. oktobur.

Formaðurin í HB-stuðlum, Sólbjørn Thomsen, er ovurhonds fegin um, at tað hevur gingið so væl við stórslignu lutaseðlasøluni, har møguligt er at vinna eina eigaraíbúð.
Mynd: Álvur Haraldsen

Formaðurin í HB-stuðlum sigur, at tað er hugaligt at siggja, hvussu stórur áhugin er fyri seðlunum, og hann fegnast eisini um, at tað er fólk úr øllum landinum, ið keypa sær seðlar.

Verður trekt á torginum í SMS

Sjálvur drátturin av vinnarunum fer at fara fram á torginum í SMS. Hetta verður fríggjadagin 22. oktober klokkan hálvgum seks á kvøldi.

Sólbjørn Thomsen sigur, at eigaraíbúðin, sum er høvuðsvinningur, enn ikki er liðug, men at hon stendur í gerð, og væntandi verður liðug innan heilt stutta tíð.

Um tað tó framvegis er onkur, sum ikki hevur ognað sær ein seðil, so ber til at keypa hesar á Shell og Statoil støðunum kring landið, umframt at tað eisini er gjørligt at bíleggja sær seðil umvegis heimasíðuna hjá HB, www.hb.fo, sigur Sólbjørn Mortensen.

Kanningar gerast av skúlaleiðara

Illgruni er um óreglusemi í starvsviðurskiftunum hjá skúlaleiðaranum í Skopun, og tí er skúlaleiðarin fyribils settur frá

STARVSVIÐURSKIFTI
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Mentamálaráðið hevur gjørt av, at kanningar skulu gerast av starvsviðurskiftunum hjá skúlaleiðaranum í Skopun.

Óreglusemi

Olaus Jespersen, deildarstjóri í mentamálaráðnum, sigur, at skúlaleiðarin í Skopun er fyribils settur frá, tí illgruni er um óreglusemi í starvsviðurskiftum hansara. Annars vil Olaus Jespersen ikki gera tær stóru viðmerkingarnar til málið, tí talan er um eitt persónsmál.

– Nú verður gjørd ein tænastumannakanning av starvsviðurskiftunum hjá skúlaleiðaranum, og tá ið hon er gjørd, og ein niðurstøða er komin, verður tað viðgjørt í mentamálaráðnum, sum síðani tekur eina endaliga avgerð í málinum, sigur Olaus Jespersen. Hann leggur afturat, at so leingi tænastumannakanning in verður gjørd, er skúlaleiðarin fyribilsfluttur í eitt lærarastarv í skúlanum, og tí røkir Katrina Joensen, lærari í Skopunar skúla, starvið sum skúlaleiðari.